**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Stuðlar til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktar-uppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intutión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir - bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Søkt verður eftir stuðul til:

**Sandavágur:**
Kvinna við ALS - Vøddasvinn.
Talan er um 35 tímar um vikuna, við skiftandi vaktum. At byrja 01. august 04. Freistin at søkja er 10. juli. 2004.

**Sørvági:**
Talan er um 35 tímar um vikuna hjá 3 vaksnum brúkarum, ið bera ymisk brek. At byrja skjótast gjørligt.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er sett til leygardagin 10. juli 04, nærri fæst at vita hjá serráðgeva, Odu Johansdóttir, tlf. 354024.

Umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin**
Att.: Oda Johansdóttir
Niels Finsensgøtu 28, 2. hædd · Fo-100 Tórshavn,
Tlf: 354024 · Telefax 354021

# Til skundverðadeildina

verður søkt eftir røskum fólki at arbeiða mánadag til fríggjadag.

Nærri upplýsingar fáast við ar ringja ella støkka inn á gólvið og spyrja eftir Christian.

BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI
Tlf. 312161

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Fysioterapeutur

Søkt verður eftir avloysara fyri fysioterpeut til fysioterapideildina á Landssjúkrahúsinum tíðarskeiðið 1. september 2004 - 31. august 2005. Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna.

**Fysioterapideildin**
Fysioterapeutarnir á Landssjúkrahúsinum hava sum endamál saman við øðrum starvsbólkum og í samstarvi við sjúklingin at bøta um fysisku, psykisku og sosialu støðuna. Vit viðgera í størri mun innlagdar sjúklingar á kirurgiskum,- medisinskum-, og psykiatriskum depli, og í minni mun ambulantar sjúklingar innan øll øki.

Á fysioterapideildini eru 11 fulltíðarstørv. Yvirfysioterapeutur, deildarfysioterapeutur, fysioterapeutar og sjúkrahjálpari, tilsamans 14 fólk.

**Førleikakrøv:**
Vit søkja eftir einum fysioterapeuti við áhuga og kunnleika at arbeiða á medisinsku deildunum. Vit vænta, at tú ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni, er opin og tilreiðar at arbeiða neyvt saman við deildunum á medisinska deplinum.

Fleiri upplýsingar um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a fáast við at venda sær til Marjun Poulsen, yvirfysioterapeut ella til Karin Djurhuus, deildarfysioterapeut á telefon 304599, lokal 5790.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fysioterapeutfelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 26. juli 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv«, við avriti av c.v., prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Søkt verður eftir

Lærara í tíðaravmarkað starv vioð Hvalvíkar skúla fyri 2004/2005 vegna avlopstímar og lækkað tímatal. Í Hvalvíkar skúla ganga 49 børn og har verða 5 lærarar.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Ynskiligt er at tann, ið settur verður, kann undirvísa í smíð.

Umsókn skal vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 29. juni 2004.

**Skúlastýrið við Hvalvíkar skúla**
v/Sólgerð Foldbo
FO-435 Streymnes

# Pedagogur og hjálparfólk

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 29 tímar um vikuna frá 16. aug. 2004. Lønarstig 10/16.

Einum hjálparfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna frá 16. aug. 2004. Lønarstig 1/5.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur við 3 stovum, 12 børnum í hvørjari, í aldrinum 3-7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Hevur góð samstarvsevnir
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Nýhugsan og ígongdsetandi
- Dámar væl at vera úti í náttúruni

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosað við leiðarin Borgarhjørt Larsen, tlf. 332948 ella 223423.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi seinast 30. juni 2004:

**Barnagarðurin »Sýslan«
FO-380 Sørvágur**

# Ólavsøkuframsýningin 2004

**Listafelag Føroya skipar fyri ólavsøkuframsýning í Listaskálanum. Øll kunnu senda verk til ólavsøkuframsýningina.**

Verkini skulu vera í hendi í seinasta lagi 18. juli. Saman við verkunum skal vera listi yvir tøkni, heiti og prís, og øll verk skulu vera týðiliga merkt samsvarandi listanum.

Tilmeldingarblað til framsýningina fæst í Listaskálanum.

Myndir undir glasi skulu hava rammu.

Listafelagið setir eina nevnd at skipa fyri framsýningini, og tilskilar sær rætt til at taka dagar í, hvussu úrval og samanseting skulu vera.

**Listafelag Føroya**
Gundadalsvegur · Postsmoga 1141
FO-110 Tórshavn · Telefon 313579

*Listaskáli er opin mánadag-fríggjadag kl. 11-17, leygardag og sunnudag kl. 14-18.*

**Arbeiðshandskar**
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar
**ADC**-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo
Sosialurin 311820



**Mentamálaráðið**
*Fólkaskúladeildin*

# Endurlýsing Lærugreinaráðgevi

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2004.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um **støddfrøði, alis- og evnafrøði og náttúra/tøkni.**

Samanlagt eru 8 lønartímar um vikuna at søkja. Umroknað er hetta 533 fyrisitingartímar fyri árið.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein og starvsøki, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta kt í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og løntir í lønarflokki 30.3. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

**Starvslýsing**
Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt:

- Ráðgevin skal í øllum lutum virka fyri einari námsligari menning í skúlanum
- Ráðgevin skal støðugt halda seg kunnugan við ta menning, sum er á námsliga, fakliga og tøkniliga økinum
- Ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum.

Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum og í toymum.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu vera Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. juni 2004.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Petur Simonsen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Mentamálaráðið og Landsmiðstøðin**

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Landsmiðstøðin** er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi.*

**Rør & Blikk**
**RØR- & BLIKKSMIÐUR**

Søkt verður eftir royndum rørsmið at byrja beinanvegin.

Starvið fevnir um rørsmið, blikksmið, vatnviðgerð til svimjihylar, og lekaleiting við sera framkomnari útgerð.

Neyðug upplæring innan lekaleiting og vatnviðgerð verður givin.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tel 322 999 · far 225 345

*Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar og lekaleiting.*

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn,
tlf: 322 999 far 225 345
www.rorblikk.fo

**Søkt verður eftir**

# mekanikarum

til at arbeiða uttanlands.

Ring 332422 millum kl. 8.00 og 16.10, ella send ein teldupost til jakup@oilwind.fo fyri at frætta nærri.

OILWIND

# Høli til leigu í Runavík

Vælegnað til handil, skrivstovu v.m. Liggur beint við høvuðsvegin, niðan fyri Sjómansheimið.

Umleið 110 km².

**Ring tlf. 772060 ella 472060**

WWW.SOSIALURIN.FO

**Ergo & Hjálpartól**
alt innan hjálpartól

# Ergoterapeutur

Søkt verður eftir ergoterapeuti, at arbeiða uml. 20 tímar um vikuna.
Arbeiðið umfatar mest ergoterapeutiska viðgerð av børnum við serligum tørvi og ráðgeving.

Børnini hava sera ymiskar trupulleikar og diagnosur so sum eti- og talutrupulleikar, motoriskar trupulleikar, down syndrom, autisme, spastikarar, seinment, fjølbrekað o.a.
Ynskiligt er um viðkomandi hevur royndir við børnum, men er hetta eingin treyt.

# Ergoterapeutur

Søkt verður eftir ergoterapeuti til avloysarastarv juli og august 2004.
Arbeiðið umfatar ergoterapeutiska viðgerð av børnum við serligum tørvi og ráðgeving.

# Sølufólk

Til arbeiði um alt landið verður søkt eftir royndum sølufólkið.

Starvið fevnir um:

- Røkja verðandi viðskiftafólk.
- Uppsøkjandi søluarbeiði.
- Tilboðsgeving.
- Upplæring av viðskiftafólki.

Vit bjóða eitt sera áhugavert og fjølbroytt starv, við nógvum avbjóðingum.

Umsøkjari við royndum innan hjálpartólaøkið hevur fyrimun, hetta er tó eingin treyt, neyðug upplæring fer fram í Føroyum og uttanlands.

Góður málkunnleiki í skrift og talu er ein fyritreyt, eins og koyrikort er neyðugt

# Handilsfólk

Søkt verður eftir fólki til avloysarastarv til handil okkara. Avloysarastarvið er í aug. og sept.
Arbeiðið umfatar handilsarbeiði og annað fyrifallandi arbeiði. Arbeiðstíðin er hvønn gerandisdag fra kl. 12 -17.30

Vit vænta at tú ert:

- Álítandi
- Fyrikomandi
- Røsk/raskur

Ynskiligt er um viðkomandi kennir til hjálpartól og ergonomiska útgerð, men er hetta eingin treyt.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til leiðarin á tel 215 778.

**Umsóknarfreist: 1. juli 2004.**

**Skrivlig umsókn við viðmælum og CV verður at senda til, viðmerkjast skal á brævbjálvan hvat starv søkt verður um:**

**Ergo & Hjálpartól**

**J.C Svabosgøta 8 * FO 100 Tórshavn**
**www.ergo.fo**

Ergo & Hjálpartól er ein fyritøka, ið umframt at selja hjálpartól til stovnar, sjúkrahús og privat um alt landið, eisini bjóðar ergoterapeutiska ráðgeving og viðgerð.
Fyritøkan er stovnað í 2001 og er í støðugari menning.